# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:


Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo



*Gudmundur Joensen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

| Einkultstartur | Tíð ½ teinur | | Longd | | | Tíð | | Longd | Meðal-ferð |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **MENN** | **MIN** | **SEK** | **KM** | **KM/T** | **H** | **MIN** | **SEK** | **KM** | **KM/T** |
| Gudmundur Joensen | 33 | 22 | 21,1 | 37,94 | 1 | 8 | 19 | 44,2 | 38,82 |
| Gunnar Dahl-Olsen | 35 | 16 | 21,1 | 35,90 | 1 | 9 | 36 | 44,2 | 38,10 |
| Torkil Veyhe | 34 | 30 | 21,1 | 36,70 | 1 | 12 | 40 | 44,2 | 36,50 |
| Andrass Joensen | 34 | 18 | 21,1 | 36,91 | 1 | 13 | 10 | 44,2 | 36,25 |
| Alfred Hummerland | 35 | 45 | 21,1 | 35,41 | 1 | 13 | 39 | 44,2 | 36,01 |
| Bogi Kristiansen | 36 | 54 | 21,1 | 34,31 | 1 | 14 | 16 | 44,2 | 35,71 |
| Joanis Albert Nielsen | 39 | 10 | 21,1 | 32,32 | 1 | 21 | 42 | 44,2 | 32,46 |
| Evald Rasmussen | 45 | 25 | 21,1 | 27,88 | 1 | 34 | 20 | 44,2 | 28,11 |
| **KVINNUR** | **MIN** | **SEK** | **KM** | **KM/T** | **H** | **MIN** | **SEK** | **KM** | **KM/T** |
| Marin Heinesen | | | | | | 58 | 40 | 31,25 | 31,96 |


*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Súkklarnir eru til reiðar

**SÚKKLING** **Nú er greitt, hvørjir súkklarar skulu umboða Føroyar á Oyggjaleikunum á Isle of Wight**

Uni Holm Johannesen

Súkklarnir hava lagt nógv fyri í fyrireikingunum undan vikuskiftinum, tá landsliðs-súkklararnir skuldu finnast. Teir royndu seg í einkultstarti og landsvegkoyring.

Fríggjakvøldið varð kappast í einkultstari. Teinurin var úr Kollafirði, norður gjøgnum Sundalagið, gjøgnum Norð-skála, vendu á landsvegnum millum Svínáir og Ljósáir, og síðani aftur til Kollfjarðar.

Leygardagin varð kappast í landavegssúkkling. Orsaka av nógva vindinum varð bara súkklað í Havn, heldur enn teinin úr Havn til Hvalvíkar og aftur. Málið var við Gróður-søluna í Hoydølum. Súkklað varð niðan á Háls, runt í rundkoyringina, oman aftur móti tyrlupallinum, fram við Strond, oman til Skansan, runt í rundkoyringini við Skanska, niðan aftur móti Gróðursøluni, niðan á rundkoyringina, har vegurin Langi og Hvítanes-vegurin møtast, og omaftur til Gróðursøluna.

Tað gekk væl hjá føroyska súkklulandsliðnum á Rhodos fyri fýra árum síðani. Liðið fekk silvurheiðursmerki í lið-kappingini. Ítróttargreinin var ikki við á Álandi fyri tveimum árum síðani.

### Hesi umboða Føroyar:

**MENN:**
Gudmundur Joensen
Gunnar Dahl-Olsen
Torkil Veyhe
Bogi Kristiansen
Morten Hansen

**KVINNUR:**
Marin Heinesen
Súsanna Skylv

# Landsliðsvenjarin skal venja botnliðið

**HONDBÓLTUR** **– Tað ber sjálvsagt til at fáa manshondbóltin í Klaksvík á føtur aftur, sigur føroyski kvinnulandsliðsvenjarin, sum eisini skal hava ábyrgdina av besa mansliðnum hjá Team Klaksvík næsta kappingarár**

Uni Holm Johannesen

Norðlýsið skrivaði um vikuskiftið, at Claus Rasmussen skal venja klaksvíkingar næsta kappingarár. Hann er framman undan landsliðs-venjari hjá kvinnum. Team Klaksvík fekk bara tvey stig í fyrstu royndini millum teir bestu.

– Tað verður neyðugt at styrkja hópin nakað, men vit halda fast um grundstammuna av ungum leik-arum, sum longu eru í Klaksvík, sigur hann við nordlysid.fo.

Fríðin Ziskason, formaður, sigur við Norðlýsið, at fleiri spælarar verða knýttir at hópinum.

– Í fyrstu atløgu styrkja vit hópin við nøkrum føroyskum leikarum, men vit umhugsa eisini útlend-ingar. Tað er ikki nøktandi at liggja í botninum av deildini, men vit hava lært eina rúgvu í ár, sigur hann.

Claus Rasmussen hevur fyrr verið venjari hjá StÍF og Neist-anum.



Taktikkurin hjá báðum liðunum var at leggja trýst høgt uppi á vøllinum. Hetta setur verjuleikarnar undir trýst, og mistøk kunnu geva málmøguleikar. Hinvegin er vandi fyri at vera yvirspældur. Verjuleikarnir á báðum liðunum dugdu væl at fyribyrgja vandamiklum málstøðum, og tí spurdust ikki teir stóru málmøguleikarnir burturúr.

*www.nsi.fo*

Løgna í dystinum var, at KÍF bara skeyt fimm í fyrra hálvleiki, men tá ið sjey minuttir vóru spældir av seinna hálvleiki, hevði KÍF longu skotið fimm mál. Fimm mál í fyrra hálvleiki, og nítjan mál í seinna hálvleiki. Løgið.

*www.neistin.fo*

Tveir minuttir inn í tíman tímdi Petur Reinert ikki meira tvætl og sendi Rógva Holm og Jovan Panic av vølli. Veit ikki rættuliga hvat var orsøkin, men at vágamenn løtu seinni fingu enn ein mann riknan av vølli fyri seinna gula kortið, gjørdi ikki støðu teirra betur.

*www.hb.fo*

Tað er ikki ofta man tosar um heiðurligt tap tá man tapir við fleiri málum, men við 6 monnum úti vegna leikbann og skaðum og trimum spildurnýggjum leikarum, má man siga at B71 liðið í dag gjørdi hvat tað kundi!

*www.b71-sandoy.com*

Stóri leikarin hjá Neistanum í vetur hevur verið Barbara Brauer. Venjarin hjá Stjørnuni hevði valt at seta Báru S. Klakstein at mannsverja hana frá fyrsti minutti hava, og hesa uppgávum greiddi Bára til ug. Hetta vísti seg eisini at ørkimla neistaleikarnar, sum høvdu trupuleikar við at fáa spælið skipað.

*www.nordlysid.fo*